

## Nyttar einki at hugsa ov langt

- Ein dystur móti heimsmeistarunum er ikki á skránni á hvørjum degi. Og tí er tað sera harmiligt, at eg skal sita uttan fyri júst tann dystin. Hinvegin fært tú ikki hugsað um næsta dyst, tá tú spælir á landsliðnum. Tá er at stríðast, og við hvørt kostar tað kort – enntá bíligt kort. At tað so var Italia, sum stóð fyri framman, er bara spell hjá mær, segði Fróði Benjaminsen á tíðindafundinum í FSF-húsinum.

## Jákup er klárur

Jákup á Borg var ikki við á HB-liðnum, sum spældi í Gøtu sunnudagin. Talan er um skaða í lærinum, men sjálvur ivast hann ikki í, at hann er tøkur til dystin móti Italia. – Lærið hevur argað eitt sindur, men eg haldi, at tað hevur stabiliserað seg nú. Og eg ivist ikki í, at eg eri púrasta til reiðar at spæla móti bæði Italia og Skotlandi.

# Lokal loysn í Klaksvík



*34 ára gamli Eyðun Klakstein hevur spælt nógv á besta KÍ-liðnum. Nú skal hann saman við Trygva Mortensen hava ábyrgdina av liðnum*

**Arbeiðsfriður skal fáast. Fram til summarsteðgin verður tað Eyðun Klakstein, sum skal venja KÍ. Hjálparvenjari verður Trygvi Mortensen.**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Gitingarnar kring venjarasessin í Klaksvík hava verið fleiri, síðani felagið fyri júst eini viku síðani gjørdi av at siga Tony Paris úr sessinum.

Fleiri nøvn hava verið nevnd, men tá avgerðin skuldi takast, varð tað ein lokal loysn, sum stóð fremst.

Eyðun Klakstein hevur í ár virkað sum hjálparvenjari hjá Tony Paris. Hartil hevur hann í fleiri ár virkað sum ungdómsvenjari í felagnum, har hann í fjør var høvuðsvenjari í ungdómsdeildini.

- Vit fegnast um, at vit fyribils kunnu loysa venjaraspurningin við eini innanhýsis loysn í felagnum. Bæði Eyðun og Trygvi hava hægstu venjaraútbúgving, teir hava báðir royndir sum spælarar og venjarar, og vit halda, at teir eru sera væl egnaðir til hesa uppgávuna, sigur Aksel Johannesen, nevndarformaður í sp/f KÍ, sum rekur Formulaliðið.

### Tol skal til

Hetta er fyrsta ferðin, at Eyðun Klakstein hevur ábyrgd av einum hópi í fremstu deildini. Og tó at møguleikin ikki kom heilt so, sum venjarin sjálvur kundi hugsað sær, so fer hann undir uppgávuna við góðum treysti

- Tað munnu verða fá venjarastørv í landinum, sum eru so krevjandi sum venjarastarvið í KÍ. Tí er hetta ein stór avbjóðing fyri meg. Eg fari tó undir uppgávuna við góðum treysti, og eg vóni, at tað kann spyrjast okkurt gott burturúr.

- Úrslitini hjá Formulaliðnum hava ikki verið tey bestu higartil í ár, men KÍ er á rættari kós. Eg fari at biðja fólk um at hava tol við liðnum og nýggju venjarunum og at stuðla okkum alt tað, sum tey kunnu.

### FAKTA

**Navn:**
Eyðun Klakstein

**Aldur:**
34 ár

**Bústaður:**
Klaksvík

**Feløg sum spælari:**
KÍ og ÍF

**Royndir sum venjari:**
Ungdómsvenjari hjá KÍ. Hjálparvenjari hjá Formulaliðnum hjá KÍ

**Venjaraútbúgving:** UEFA A-útbúgving

## Formula-liðið




*Sosialurin mannar Formula-liðið við teimum spælarum, sum stóðu seg best í 10. umfarinum av Formula-kappingini*

## Stevna móti fyrstu finaluni

**Hvørki EB/Streymur ella Skála hava áður spælt steypafinalu í vaksnamannafótbólti. Hesa ferð fær annar av teimum tó møguleikan**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørrk*
*jakup@sosialurin.fo*

Lutakast til hálvfinalurnar í kappingini um Løgmanssteypið var í 3-2 í gjár. Skal metast eftir stigatalvuni í Formula-deildini, so fekk HB besta lutakastið. Meistararnir skulu nevnliga spæla hálvfinalur móti VB/Sumba, og tó at einki er avgjørt, fyrr enn tvær ferðir 90 minuttir eru spældir, so er lítil ivi um, at HB er risa-favorittur at spæla seg í finaluna.

Hin hálvfinalan tykist meira opin. EB/Streymur og Skála eru um nakar liðini, sum hava gjørt vart við seg í føroyskum fótbólti seinnu árini.

Enn hevur eingin teirra tó verið partur av einum finaludysti í steypakappingini, men tí møguleikanum fara tey at stríðast fyri í hálvfinalunum.

Hálvfinalurnar í kappingini um Løgmanssteypið verða spældar tann 13. juni og 11. juli. Finalan verður spæld 15. august á ovara vølli í Gundadali.